# Lønin skal minst vera 200.000 kr. um árið fyri at nakað skal loypa av

**Ein nýggj kanning vísir, at tey, sum ikki forvinna meiri enn 200.000 krónur um árið, hava ikki ráð til nakað sum helst, uttan tað, sum er alneyðugt til lívsins uppihald**

KEYPIORKA
*Áki Bertholdsen*

Fyri at fáa ráð til klæðir upp á kroppin, skógvar upp á beinini, ella bil í túnið, má eitt fólk hava minst 200.000 krónur í inntøku um árið.

Hetta vísir ein nýggj kanning, sum grannskoðaravirkið Rasmussen & Weihe hevur gjørt.

Grannskoðaravirkið hevur gjørt kanningina fyri Føroya Arbeiðarafelag og hon varð løgd fram á aðalfundi í felagnum um vikskiftið.

Í Sosialinum í gjár greiddu vit frá, at kanningin vísti, at hóast sáttmálasettu lønirnar hjá einum arbeiðara í Føroyum er hækkað 9% hesi bæði seinastu árini, eru allar vørur dýrkaðar so nógv, at hann er verri fyri nú, enn hann var, áðrenn lønarhækkingina. Príshækkingin hevur verið eini 10% í meðal hesi bæði seinastu árini, og sostatt er ein vanligur løntakari í Føroyum líka illa fyri nú, sum hann var, áðrenn lønarhækkingina, hóast skatturin eisini er lækkaður eitt sindur.

Í roknistykkinum varð gingið út frá einum arbeiðara, sum hevur fult tímatal, tvs, 1.800 tímar um árið. Hjá einum slíkum, við vanligum útreiðslum, mangla 3.000 krónur í um árið, til klæðir, barnaansing, bil, tryggingar, húsarhaldstól o.a., tá ið tær heilt alneyðugu útreiðslurnar eru goldnar, t.d. rentur og avdráttir, olja, streymur og matur.

Hjá tí, sum ikki fær fult tímatal, og tey eru mong, manglar enn meiri í. Hjá tí, sum hevur møguleika fyri nøkrum yvirtímum, sær hinvegin frægari út.



*Hevur eitt húski møguleika fyri at forvinna nøkur oyru eyka, er tað av stórum týdningi, at tey hugsa seg væl um, hvør skal arbeiða eyka, tí tvær intøkur uppá 100.000 krónur sleppa rættiliga nógv bíligari í skatti enn ein inntøka upp á 200.000 krónur, sigur Árni Absalon, grannskoðari, tá ið hann legði nýggjastu kanningina um liviumstøðurnar hjá vanligum fólki fyri aðalfundin íFøroya Arbeiðarafelag*

### Krevjast minst 200.000 krónur í inntøku

Kanningin hjá Rasmussen & Weihe vísir eisini, at lønin skal upp á 200.000 krónur, fyri at eitt oyra skal loypa av til nakað, uttan tær útreiðslur, sum er alneyðugar til lívsins uppihald.

Tær útreiðslur, sum verða roknaðar uppí tað allarmest neyðuga til lívsins uppihald, eru olja, sjúkrakassi, matur, rentur og avdráttur, ella leiga, streymur, telefon og sjúkrakassi.

– Men tað er ikki tað stóra, sum loypir av, tí tann, sum forvinnur 200.000 krónur um árið, hevur ikki meiri enn 8.873 krónur eftir um árið til klæðir, barnaansing, bil, tryggingar, húsarhaldstól o.s.fr.

Samstundis hevur hann goldið 80.790 krónur í skatti, AlS og til samhaldsfasta, umframt mvg.

Tað er ikki fyrrenn ein hevur forvunnið 250.000 krónur, at 28.838 krónur verða eftir eitt heilt ár til barnaansing, bil, klæðir, húsarhaldstól, tryggingar, umvæling av bústaði og aðrar útreiðslur.

### Skulu hugsa seg væl um

Men í hesum sambandi ger grannskoðarin vart við, at tað er stórur munur á einari inntøku uppá 250.000 krónur og so tveimum inntøkum upp á tilsamans 250.000 krónur.

Hann segði, at tá ið ein inntøkan fer uppum 150.000 krónur, veksur skattatrýstið rættiliga skjótt.

Hetta er tað fyribrigdi sum nevnist marginalskatturin. Tað merkir, at tær síðstu krónurnar, ein forvinnur, verða nógv harðari skattaðar enn tær fyrstu krónurnar.

– Eitt nú sleppa tvær inntøkur uppá 100.000 krónur rættiliga nógv bíligari í skatti enn ein inntøka uppá 200.000 krónur.

– Eru tað eini hjún, har annar parturin hevur møguleika at forvinna eitt sindur afturat, er tað tí av størsta týdningi, at tey hugsa seg væl um, hvør fær hesa eykainntøkuna. Marginalskatturin ger, at tað loysir seg rættiliga væl at lata tann, sum frammanundan forvinnur minst, taka teir eyka tímarnar, sum eru

– Tí hevði tað eisini verið ein stórur fyrimunur hjá nógvum húskum, um inntøkurnar høvdu verið býttar sundur ímillum mann og konu, áðrenn skatturin verður roknaður.

Sí talvu!

Tað er nógv arbeiðarahúski, har bæði maður og kona hava inntøku, men tey hava ikki støðugt arbeiði og fáa tískil ikki fult tímatal fyri árið.

Í hesi talvuni er dømi um eitt húski við tveimum inntøkum, har annar parturin forvinnur 150.000 krónur og hin parturin 100.000 krónur um árið.

Húskið hevur tvey børn og tí er roknað við barnafráfrádrátti í kommunuskattinum og landsskattinum upp á 7.000 krónur fyri hvørt barnið. Annars eru fortreytirnar tær, sum greitt er frá aðrastaðni her á síðuni.

Talvan vísir, at tá ið skattur, fastar útreiðslur og matur eru goldin, hava hesar báðar inntøkurnar 35.307 krónur í avlopi fyri alt árið til klæðir, barnaansing, innbúgv, trygging, umsiting av bústaði, bil o.s.fr. Tað eru beint undir 3.000 krónur um mánaðin og tað kann ikki sigast at vera nógv hjá einum húski upp á fýra fólk.

Leggjast kann afturat, at av hesum báðum inntøkunum upp á tilsamans 250.000 krónur, eru 93.878 krónur, ella 38% farin í landskassan í saktti, mvg o.s.fr.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Løn | 150.000 | 100.000 | 250.000 | Skattur vm. |
| Løn eftir limagjald | 147.000 | 98.000 | 245.000 | |
| Skattur, Als vm. | - 51.415 | - 29.440 | - 80.855 | 80.855 |
| Barnafrádráttur | | | 14.000 | - 14.000 |
| Sjúkrakassi | | | - 4.000 | |
| Matur (2 vaksin, 2 børn) | | | - 51.000 | 10.200 |
| Ymsar útr. sb. sundurgreining | | | - 87.838 | 9.208 |
| Rest til aðrar útreiðslur | | | 35.307 | 7.615 |
| | | | | 93.878 |

## Fortreytir fyri kanningini

Tá ið Árni Absalonsen, grannskoðari hjá Rasmussen & Weihe, legði nýggju kanningina um livikorini hjá vanligum fólki fyri aðalfundin hjá Føroya Arbeiðarafelag, ásannaði hann, at tað kundi vera ómetaliga trupult at vísa akkurát, hvussu støðan er hjá fólki.

Hetta kemst av, at tað eru neyvan tvy húski í øllum landinum, har viðurskiftini eru akkurát tey somu.

Tó eru nógv viðurskifti felags, so hann helt, at tað bar væl til at geva eina góða mynd av støðuni.

Í kanningini, sum Rasmussen & Weihe hevur gjørt fyri Føroya Arbeiðarafelag, hevur verið roknað við, at útreiðslurnar til bústað eru 4.500 krónur um árið.

Hendan útreiðslan kann antin verða brúkt til at betala leigu fyri, ella hon kann verða brúkt til at betala rentur og avdráttir fyri.

Verður hon brúkt til leigu, fær hetta fólki ongan rentustuðul. Verður hon brúkt til rentur og avdráttir, svarar tað til eitt lán uppá 800.000 krónur, sum verður betalt uppá 24 ár við 7% í rentu. Hetta fólkið fær rentustuðul, men hann er lækkaður í ár og lækkar enn meiri næsta ár. Í fjør var hann 48% og í ár er hann 44%.

Oljunýtslan er sett til 4.000 litrar um árið. Eini vanlig hús brúka ímillum 4.000 og 4.500 litrar um árið. Elnýtslan er sett til 5.000 kilowatt um árið. Telefonrokningin er 500 krónur um mánaðin og húskið rindar bæði útrvarps- og sjónvarpsgjald.

Útreiðslurnar til mat eru mettar at vera 16.000 krónur um árið til eitt vaksið fólk.

Hetta er mett útfrá kanningini, sum ein bólkur gjørdi fyri fakfeløgini í 1998.Tá varð mett, at ein vaksin maður skuldi brúka 13.968 krónur um árið til mat. Síðani eru matvørur dýrkaðar og eftir prístalinum var hetta talið tískil komið upp á 16.500 krónur á nýggjárinum 2000, tvs, fyri trimum mánaðum síðani.

Roknað er eisini við skattalættanum,sum kom 1. januar.Annars er roknað við vanligum landsskatti og einum kommunuskatti upp á 20%.

Àrni Absalonsen sigur at enda, at eftir prístalinum eru allar útreiðslur, sum eru við í prístalinum, hækkaðar.Mest er oljan dýrkað, men í miðal eru prísirnir í hækkaðir umleið 10%.



# Føroya Arbeiðarafelag fingið nýggjan lim í stjórnina

**Harry Benjaminsen av Toftum er nýggjur stjórnarlimur í landsins størsta fakfelag**

STJÓRNARSKIFTI
*Áki Bertholdsen*

Føroya Arbeiðarafelag fekk ein nýggjan lim í stjórnina á aðalfundinum um vikuskiftið.

Tey, sum stóðu fyri vali, vóru Ingeborg Vinther, formaður, Elias Hansen, næstformaður og Kári Jacobsen.

Úrslitið av nevndarvalinum var, at Harry Benjaminsen av Toftum varð valdur í stjórnina fyri Kára Jacobsen úr Vági.

Kári Jacobsen kom í stjórnina í Føroya Arbeiðarafelag í 1994 og hevur sitið síðani.

Harry Benjaminsen var tiltakslimur í nevndini, men er nú stjórnarlimur.

Men hvønn limirnir vilja hava til formann var ongin ivi um. Ingeborg Vinther fekk at kalla hvørja atkvøðu á aðalfundinum og hon heldur tí fram sum formaður í minst tvey ár afturat.

Fyrsti tiltakslimur í Føroya Arbeiðarafelag er Karla Einarsson úr Runavík, annar tiltakslimur er Steingrím av Vollanum úr Fuglafirði og triði tiltakslimur er Albert Johannesen úr Hvannasundi.



*Hetta er nýggja stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag. Frá vinstru eru tey Margretha Rasmussen úr Fuglafirði, Harry Benjaminsen av Toftum, standandi, Georg Hansen úr Sørvági, Marius Clementsen av Sandi, Ingeborg Vinther úr Vági, formaður, Elias Hansen av Skála, næstformaður og ytst til høgru, Leila Zachariasen úr Hoyvík, sum eisini er formaður í S&K*



*Tað kann vera langligt at sita á aðalfundi í tveir heilar dagar. Tá er gott at hava stokkar við - og onkur er altíð, sum vil hjálpa einum at vinda eina hespu*

## Føroya Arbeiðarafelag fingið nýtt navn

**Føroya Arbeiðarafelag hevur ný fingið eitt nýtt undirheiti fyri eisini at hýsa serarbeiðarum**

NAVNABROYTING
*Áki Bertholdsen*

Føroya Arbeiðarafelag hevur nú fingið nýtt navn. Sjálvt navnið Føroya Arbeiðarafelag, verður ikki broytt, men nú hevur felagið eisini undirheitið Føroya Arbeiðara- og Serarbeiðarafelag.

Tað var stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag, sum skeyt upp fyri aðalfundinum hjá felagnum at geva felagnum hetta undirheitið, og tað varð samtykt.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag segði, at stjórnin helt, at navnabroytingin var hóskandi, tí samfelagið hevur ment seg soleiðis, at nú á døgum eru næstan allir arbeiðarar at serarbeiðarar av ymsum slag, bæði tey, sum arbeiddu í fiskivinnuni, hjá Landsverkfrøðinginum o.s.fr.

Hon vísti eisini á, at nú oljuvinnan er við at taka seg upp, eru øll, sum arbeiða í tí vinnuni, serarbeiðarar av ymsum slag.

– Hetta eru arbeiðsfólk, sum eisini hoyra heima í Føroya Arbeiðarafelag og tí halda vit eisini, at tað er rætt at broyta navnið, so at tað eisini umfatar hesi fólkini, segði Ingeborg Vinther.


Siti/standiborð

Reis teg upp

- og tak borðið við



Siti/standiborðini gerast alt vanligari á skrivstovunum kring Europu - og nú eisini í Føroyum



Meiri enn helmingurin av seldu skriviborðunum í Danmark seinasta árið vóru av hesum slagi. Nú kanst tú sjálv/ur lættliga velja arbeiðsstøðuna, sum passar tær - og rygginum - best!

El-stýrd siti/standiborð úr kr. 9.900,-

FARODANE

Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
Fax 317534
e-postur:
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo

*Farodane er 50 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði.*

FARODANE 02-01